

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 03 - 2013

# Grønland kanska ov dýrt fyri kinesarar

Danski sendiharrin í Kina, Friis Arne Petersen, heldur ikki, at kinesiski áhugin fyri at gera íløgur í Kina verður so stórur, tá saman um kemur, sum politikarar og fjølmiðlar hava tosað og skrivað um. -Tað kalda veðrið og tann langi teinurin kunnu gera Grønland dekan ov dýrt fyri kinesarar, sigur sendiharrin við Nordjyske Stiftstidende. Hann vísir á, at flutningskostnaðurin verður sera stórur, og at Kina hevur ikki ráð til at reka námsvinnu nakrastaðni í heiminum, uttan at fyritøkurnar halda tær øll tey lokalu krøvini á staðnum. -Alt annað líka verður framleiðslukostnaðurin ógvuliga høgur, sigur Friis Arne Petersen við blaðið. Sum skilst hava kinesiskir íleggjarar áhuga í einari námsætlan einar 150 kilometrar í landnyrðing úr Nuuk, men danski sendiharrin í Beijing væntar, at avstraliumenn fara at geva kinesarunum ein skarpan gang í kappingini um námsverkætlanir í Grønlandi. -Tær almennu kinesisku fyritøkurnar, sum skulu fremja ætlanina, mugu tryggja sær, at teirra fíggjarligu viðurskifti eru í lagi, og tí fara tey at kanna kostnaðin til fulnar. Tær avstralsku fyritøkurnar eru hinvegin vanar við høgan framleiðslukostnað, sigur Friis Arne Petersen. Grønlendski landsstýrismaðurin í tilfeingismálum, Ove Karl Berthelsen, hevur ikki dult fyri, at hann vil fegin hava kinesiskar íløgur til Grønlands. Í donskum fjølmiðlum hevur verið tosað og skrivað um, at umleið 3.000 lágløntir kinesarar skulu til Grønlands at gera námið, og at umleið 700 grønlendingar fáa arbeiðið har, tá námið fer undir framleiðsluna.